BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

2. februar 2024
Mál: 22/22133-63
Viðgjørt: MM

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-074/2023, eftir tingskipanini § 52 a, frá Liljan Weihe, løgtingskvinnu, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismann í barna- og útbúgvingarmálum.

Fyrispurningur um børn og ung, sum føroyskir myndugleikar senda til Danmarkar – um barnaverndartænastur og barnaverndarlógina

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu vil landsstýrismaðurin tryggja, at barnaverndirnar kring landið halda Barnaverndarlógina og liva upp til ásetingarnar í lógini um eftirlitsvitjanir og barnasamrøður?
2. Hvussu vil landsstýrismaðurin tryggja, at tænastustøðið hjá barnaverndartænastunum er á sama støði um alt landið?
3. Hvat hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið gjørt fyri at tryggja, at barnaverndarlógin verður fylgd, eftir at Løgtingsins Umboðsmaður hevur vist á, at ásetingar í lógini ikki verða hildnar?

Svar

Til 1, 2 og 3: Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum hevur sambært § 67 í barnaverndarlógini skyldu til at hava eftirlit við, at kommunurnar og Barnaverndarstovan fylgja ásetingunum í barnaverndarlógini.

Endamálið við eftirlitinum er at tryggja, at lóggávan á barnaverndarøkinum verður nýtt rætt og á ein slíkan hátt, ið fremur endamálið við barnaverndarlógini. Talan er um eitt rættargildiseftirlit (legalitetstilsyn), sum merkir, at ráðið fremur eftirlit við, at lóggávan á økinum verður hildin, eins og ráðið av sínum eintingum kann útinna eftirlit við barnaverndartænastunum kring landið.

Í 2021 framdi táverandi Almannamálaráðið ***(núverandi Barna- og útbúgvingarmálaráðið)*** eftirlit við útvaldum barnaverndartænastum kring landið. Yvirskipað vísti hetta eftirlit, at barnaverndartænasturnar leggja dent á at fylgja lóggávuni á økinum, og at lóggávan verður fylgd.

Ætlanin er framhaldandi at fremja hesi eftirlit við barnaverndartænastunum fyri at tryggja, at barnaverndarlógin verður fylgd. Harumframt er ætlanin framhaldandi at arbeiða við at menna barnaverndarøkið, soleiðis at øll umsorganaryvirtikin børn í Føroyum kunnu trívast og mennast í einum samfelagi, har dentur verður lagdur á at raðfesta børn og ung, ið hava brúk fyri serligum stuðli.

Felagsreglur í barnaverndarlógini og eftirlit eru við til at tryggja, at barnaverndarøkið verður umsitið eins, og at tænastustøðið í ymisku kommununum er á sama støði.

Grundað á frágreiðingina hjá Løgtingsins Umboðsmanni um barnasamrøður, er Barnaverndarstovan í ferð við at gera eina mannagongd um, hvussu barnasamrøður skulu verða framdar. Hetta fyri at tryggja, at barnaverndarsamrøður verða framdar einsháttaðar og sambært barnaverndarlógini.

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður